# Søgan endurtók seg



HB-kvinnurnar vunnu gullið í steypakappingini, eftir eina spennandi og javna finalu ímóti KÍ.

Mynd: Jens Kristian Vang

**Eftir spennandi, málríka og dramatiska uppgerð, sum var sera átøk finaludystinum ímillum somu feløg fyri tveimum árum síðani, vóru tað enn eina ferð tær í HB, sum drógu longra stráði**

KVINNUFINALA
*Jóannes Hansen*

Tað minti ikki sørt um finaluna í Oyggjaleika kappingini. Og tað var meinlíkt finaludystinum fyri tveimum árum síðani. Tá tókust HB og KÍ. Ta ferðina megnaði KÍ at javna í síðstu løtu í vanligu leiktíðini, men í longdu leiktíðini skoraði HB sigursmálið. Hesa ferð megnaði KÍ at javna stutt undan dystarenda, einki mál kom í longdu leiktíðini, og í brotssparkskappingini misnýtti KÍ eina roynd, meðan allar fimm úr HB skoraðu.

Við gongdini í landskappingini í huga kundi roknast við, at KÍ fór at vinna. Tað sá eisini út til, at KÍ beinanvegin hevði yvirtakið. Tær høvdu fleiri vandamikil álop, og Bára Skaale legði KÍ framum, tá hon úr stórari fjarstøðu gyppaði bóltin, soleiðis at hann dalaði í málið.

Um KÍ hesa løtuna hevði kent sína vitjunartíð og økt um munin, so er væl hugsandi, at tað hevði tørnað heilt øðrvísi út.

Og hjá HB sá tað avgjørt ikki ljóst út. Annar av landsliðs útisetunum, Eyðvør úr Dímun, var eftir lítlari løtu so óheppin, at hon meiddi sær annað knæið so mikið illa, at hon noyddist at taka seg av vøllinum. Linda Jacobsen kom á vøllin, og HB venjarin, Jákup Bogi Joensen, kendi seg noyddan at gera fleiri rokeringar.

Men hóast annar útisetin var farin av vøllinum, so hevði HB hin útisetan á vøllinum alla tíðina, og tað var fyrst og fremst Helga Ellingsgaard, sum var meistari fyri øllum málunum hjá HB.

Tá HB javnaði, fór hon framvið fleiri av mótstøðuspælarunum, áðrenn hon legði bóltin fyri føturnar á Vivian Thorleifsson. Tíggju minuttir inn í seinna umfarið legði Helga HB framum, tá hon – hóast hon var nógv kroyst – meistarliga tveitti seg fram og stútaði hornasparksinnlegg úr høgru í málið, og eftir at KÍ hevði javnað til 2–2, var tað aftur Helga, sum legði HB framum 3–2. Ta ferðina ballónstútaði hon langan og høgan frísparksbólt frá HB liðformanninum, Anniku Godtfred, í málið.

HB hevði leikliga yvirvág seinna partin av fyrra umfarinum og eina løtu av 2. hálvleiki. Helga Ellingsgaard var stóra drívmegin, men HB megnaði ikki at spæla seg til nógvar upplagdar møguleikar.

### Viljin var góður

Hjá KÍ, sum stríddist, men ikki náddi leikliga støðið, tær hava víst fyrr í summar, haltaði tað í orðsins sanna týdningi. Rannvá Andreasen, sum hevur so ógvuliga stóran týdning fyri liðið, var eitt sindur darva av liðbandsskaðanum, og tað kostaði nógv. Kristina Eyðbjørnsdóttir kom ikki á vøllin, fyrrenn tað bara restaði ein lítil løta av 1. hálvleiki. Tað var ivaleyst eitt mistak.

Men KÍ vildi vera við, og hóast HB í 2. hálvleiki kom tvær ferðir á odda, so megnaðu tær úr Klaksvík at koma afturíaftur. Fyrru ferðina var tað Malena Josephsen, sum javnaði eftir uppspæl í vinstru. Sera hegnisliga tamdi álopsspælarin bóltin við sær og setti framvið landsliðsmálverjanum.

Tíðin var av álvara farin at ganga undan, tá KÍ javnaði til 3–3. Málið hevði leingi verið á veg, men tað gekst striltið. Rannvá smekkaði upp undir tvørtræið og niður á málstrikuna, og Malena hevði sent í stólpan, áðrenn Bára Skaale javnaði. Við snildum og neyvum hornasparki úr vinstru skrúvaði hon bóltin upp í handara hornið.

So komu ikki fleiri mál. Heldur ikki í umdystinum, tá HB seinastu sjey minuttirnar vóru undirmannaðar. Eyðfríð Kristiansen sá reytt, tá hon ikki helt tað vera nóg mikið, at dómarin sektaði KÍ fríspark.

Tað kundi kanska roknast við, at KÍ fór at leggja trýst á í umdystinum – serliga eftir at ein HB spælari var rikin av vøllinum – men tað var meiri HB, sum hevði bóltin hesa løtuna.

– Í tí støðuni, sum vit vóru komnar í, sóu vit brotssparkskappingina sum okkara møguleika, segði HB liðformaðurin eftir dystin. Og tað eydnaðist HB at vinna. Tí ynskja vit teimum hjartaliga tillukku við. Leygardagin helt venjarin hjá teimum, Jákup Bogi Joensen, fyri í blaðnum, at tað sær ikki serliga ljóst út fyri tað, sum er eftir av landskappingini. Steypasigurin átti at verið góður íblástur hjá teimum, sum ætla sær at halda fram at spæla.

Hjá KÍ var tað snópisligt at tapa. Og ikki minst meint mundi tað kennast hjá Báru Skaale, sum við tveimum málum hevði syrgt fyri at halda klaksvíkskvinnum inni í dystinum, og sum til endan misnýtti avgerandi brotssparkið.

– Nú mugu vit halda fram at stríðast í landskappingini. Tað hevur gingið væl, men nú eru stigini nullstillaði. Møguleikin fyri at endurvinna bæði steypakappingina og FM heitið er nú farin, men vit mugu royna at koma aftur, helt Malena Josephsen, hjá KÍ, sum saman við liðfeløgunum umframt FM heitið eisini hevur Europa Cup kappingina at fyrireika seg til.

## Hagtøl

### Steypakappingin hjá kvinnum

**HB–KÍ 3–3 (1–1) 8–7** eftir longda leiktíð og brotssparkskapping

Á Ovara vølli í Gundadali ólavsøkudag 2001, kl. 13.00

**Dómarakvartett:** Eiler Rasmussen, Páll Augustinussen, Ólavur Weihe og Georg N. Rasmussen

0–1: Bára Skaale 14.
1–1: Vivian Thorleifsson 18.
2–1: Helga Ellingsgaard 54.
2–2: Malena Josephsen 76.
3–2: Helga Ellingsgaard 81.
3–3: Bára Skaale 87.
Brotssparkskappingin
3–4: Ragna Andreasen
4–4: Eyðvør Thomsen
4–5: Kristina Eyðbjørnsdóttir
5–5: Liljan av Fløtum Jespersen
5–6: Jensa Sirdal
6–6: Annika Godtfred
Bára Skaale misnýtti
7–6: Lydia Vesturtún
7–7: Malena Josephsen
8–7: Helga Ellingsgaard

**HB:** 1. Annika Hansen – 17. Fríða Petersen, 7. Silja á Borg, 12. Liljan av Fløtum Jespersen, 15. Eyðvør Thomsen – 10. Annika Godtfred, liðformaður, 14. Eyðvør úr Dímun (4. Linda Jacobsen, 13.), 8. Helga Ellingsgaard, 11. Eyðfríð Kristiansen – 9. Vivian Thorleifsson, 6. Lydia Vesturtún
**Á beinkinum uttan at verða skiftar inn:** 16. Randi Wardum, 2. Nancy Justinussen, 3. Gudny Langgaard, 5. Fríða Hansen
**Gult kort:** eingin
**Reytt kort:** Eyðfríð Kristiansen 103.
**Venjari:** Jákup Bogi Joensen

**KÍ:** 16. Vivi Andreasen – 14. Una Olsen, 7. Ragna Andreasen, liðformaður, 19. Paula Sjóstein – 6. Jensa Sirdal, 20. Bára Skaale, 9. Rannvá Andreasen, 2. Vivian Bjartalíð, 4. Ann Olsen – 18. Elsa Maria Simonsen (12. Kristina Eyðbjørnsdóttir, 38.), 8. Malena Josephsen
**Á beinkinum uttan at verða skiftar inn:** 1. Anna Müller Jacobsen, 3. Sigrid Mikkelsen, 10. Annelisa Justesen, 17. Petra Sjóstein
**Gult kort:** Rannvá Andreasen, 27., Ragna Andreasen, 56., Kristina Eyðbjørnsdóttir, 62. og Vivian Bjartalíð 63.
**Reytt kort:** eingin
**Venjari:** Jón Harald Poulsen
**Liðleiðari:** Margit Gaard Joensen





# Páll Fanga kvinnurnar vóru um at spreingja seg

**Hóast tær vóru ov skjótar við endaspurtinum, so var tað kortini eingin, sum megnaði at hótta kvinnurnar í Klaksvík, sum endaðu við fullum stigatali**

6–MANNAFØR KVINNUR
*Jóannes Hansen*

Páll Fanga kvinnurnar settu ólavsøkuaftan eitt flott punktum fyri eitt fínt róðrarár. Tær hava tikið lut í øllum seks FM stevnunum, og tær hava vunnið hvørja ferð.

Tá 6–mannaførini við kvinnum komu inn við Molanum, tóktist eingin sum helst ábending vera um, at nakar skuldi gera nakað sum helst við Páll Fanga. Saman við Gongurólvi høvdu tær fingið ein fínan start. Og tá tann fyrsti startspurturin var av, og tær fóru undir stutta lunnaróðurin, høvdu tær á Páll Fanga longu vunnið ein skut.

Knappliga á Molanum var hálvarógvið, og tá var skuturin vorðin til eina lítla hálva bátslongd. So spentu klaksvíks kvinnurnar uppaftur meiri í, og eina lítla løtu sá tað út til, at talan skuldi gerast um sannan uppvísningsróður.

Men tíðirnar vísa, at soleiðis endaði tað ikki. Páll Fangi fekk aftur hesa ferð fult stigatal, men Sølmundur var ikki meiri enn eina lítla hálva bátslongd aftanfyri.

– Eg má taka ábyrgdina av, at tað kiksaði eitt sindur hjá okkum. Vit fóru fyrri enn hinar upp í bekk at spurta. Spurturin gjørdist longri, enn vit høvdu ætlað, og tað bar við sær, at tað stóð ikki so væl til við luftini síðsta teinin, men tíbetur høvdu vit ov mikið at geva av, so tað var eingin trupulleiki at varðveita oddastøðuna.

Hetta sigur Solby Eliasen. Hon er stýrimaður, bátsformaður og ein av íblásarunum umborð á Páll Fanga. Og hon er tilstundandi mamma. Gongur tað, sum tað skal, so verður hon gestur á føðistovuni á sjúkrahúsinum um ein stóran mánað ella so.

So fer tað at vísa seg, hvussu nógvar av Páll Fanga kvinnunum fara at vera við, tá sannførandi FM heitið skal verjast, og tá tað nakað undan norðoyarstevnu skal farast niður á Scilly oyggjarnar.

*Páll Fangi vann allar róðrarnar á árinum, og tær sleppa tí at royna seg á Scilly oyggjunum*

Mynd: Jens K. Vang



### Akkurát ov stuttar

Sølmundur fekk einki stig á vestanstevnu, tí tær hingu fastar í startinum. Tí mistu tær næstfremsta plássið í FM kappingini. Á ólavsøku gjørdu tær alt, sum tær orkaðu, fyri at endurvinna silvurplássið. Tað eydnaðist ikki, men úrslitið hjá Sølmundi var ikki so nógv at siga til.

Starturin hjá Sølmundi var ikki serliga góður. Umframt Páll Fanga fóru eisini Gongurólvur og onkrir aðrir bátar strúkandi framum. Sølmundur lá dygst undir Molanum. Kanska var orsøkin tann, at tær høvdu áskoðararnar so tætt upp at sær. Í hvussu so er høvdu tær ein sera sannførandi endaspurt og endaðu bara eina hálva bátslongd aftanfyri Páll Fanga.

Jarnbardur fekk handað FM silvur merkini. Tær høvdu ein hálvvánaligan start, men tær megnaðu at berja seg fram á fjórða plássið, og harvið vóru tær tvey stig undan Sølmundi, sum fekk bronsu.

# Strandingar settu hinar fjarbúgvarnar upp á pláss

**Sammett við vestanstevnuna býttu strandingar og teir umborð á Sølmundi um pláss, meðan klaksvíkingar umborð á Pálli Fanga hildu tørn um næstfremsta plássið**

6–MANNAFØR MENN
*Jóannes Hansen*

Mest spennandi róðurin ólavsøkuaftan var leingi tættur. Men á síðstu trý hundrað metrunum var eingin ivi. Strálan av Strondum tóktist hava mestu orkuna, og á málinum vóru strandingar eina lítla hálva bátslongd undan teimum næstu.

Tað var ikki fyrrenn upptøkurnar vórðu spældar umaftur, at tað varð staðfest, at aftur hesa ferð hevði Páll Fangi snýtt annan av avbjóðarunum til fremsta plássið.



*Strálan drúgvari í tøttu kappingini við Sølmund*

Mynd: Jens K. Vang

Strálan og Sølmundur høvdu møguleika at vinna FM heitið. Í Sørvági vann Sølmundur, meðan Strálan noyddist at lata sær lynda triðja plássið. Púra óvæntað ta ferðina snýktu klaksvíkingar, sum í hinum róðrunum høvdu verið rættuliga spakir, seg fram á annað plássið. Hesa ferð var tað kanska ikki so óvæntað, men teir umborð á Páll Fanga megnaðu enn eina ferð at syfta ein favoritt. Hesa ferð var tað Sølmundur.

Longu í startinum var tað týðuligt, at nógv stóð upp á spæl, og at tað hevði avgerandi týdning at koma væl frá byrjan.

Tvær ferðir noyddist dómarin at skjóta róðurin av. Fyrru ferðina var tað Strálan, sum leyp avstað, og seinnu ferðina vóru tað teir í Hvalvík/Streymnesi, sum fleiri av undanfarnu árunum plagdu at vera so óførir, sum lupu avstað, tá startdómarin hevði rópt klárir, og áðrenn skotið gekk av.

Fortuna úr Vestmanna fekk besta startin. Leingi sá tað út til, at hetta skuldi verða róðurin, sum vestmenningar skuldu vinna í ár, men tá teinurin var hálvrógvin, gjørdist tað alt meiri týðuligt, at leikluturin hjá Fortununi var at vera hara, sum teir plaga at taka til í rennikappingum. Hugtakið verður nýtt, tá teir kappast á longu teinunum, og ein rennari leggur sera bragdliga fyri. Hann fær løn fyri at fáa ferðina upp og harvið góðar tíðir. So liggur verturin á, at haran ikki orkar at renna meiri enn helmingin av ásetta teininum.

Tað kundi kanska roknast við, at Strálan fór at koma í trupulleikar, tí strandingar í so at siga øllum hinum kappingunum hava verið stetlandi í startinum. Men soleiðis var tað ikki hesa ferð. Strálan, Páll Fangi og Sølmundur lógu rættuliga javnir inn ímóti Molanum, meðan fjórði báturin, sum varð mettur sum møguligur kandidatur til ólavsøkusigurin, Riddarin úr Miðvági, hevði ilt við at hanga uppií.

Í fjør vunnu Strálumenninir fyri fyrstu ferð á ólavsøku. Leygardagin vunnu teir fyri aðru ferð á rað, og harvið kom FM heitið eisini til høldar. Vit ynskja Stráluni og strandingum tillukku við báðum sigrunum.